gult12 cyan12 magenta12 svart12



VIÐMERKINGAR

# Frá umhvørvisstevnu í Vestmanna til ruskposalitir hjá IRF

**Vegna IRF**
**Ingvard Fjallstein**
*23-05-01*



Í døgunum frá 14. til 17. mai varð skipað fyri umhvørvisviku í Vestmanna. Tað var viðalundanevndin í Vestmanna sum stóð fyri tiltakinum. Skráin var fjølbroytt og viðgjørdi áhugaverd viðurskifti bæði á sjógvi og landi. Tíverri vórðu onkrar misskiljingar og óhepnir pástandir settir frá í sambandi við stevnuna.

Hetta er eitt gott tiltak, sum bæði tekur umhvørvið á staðnum og í størri høpi í til viðgerðar. Líknandi stevnur áttu at verið hildnar aðrarstaðir í landinum eisini, um ikki hvørt ár so av og á. Bert spell, at so fá fólk møta á tílíkum tiltøkum. Kanska er árstíðin ikki tann rætta til innanduratiltøk av hesum slag.

### Burðardyggir firðir

Mánakvøldið var evnið »Hvussu kunnu firðirnir haldast reinir fyri burðardyggari vinnu?«. Hetta er ein sera áhugaverdur spurningur fyri alivinnuna. Kundi tíverri ikki vera á fundinum hetta kvøldið, men fekk ein samandrátt á fundinum mikukvøldið. Hugskotið er at sópa undan alibrúkunum við eini »Lift up«-skipan. Skipanin fær lortin upp til vatnskorpuna. Síðani skal ein skiljiskipan fáa hann úr sjónum upp á land.

Hetta er eitt stórt og truplult tiltak. Umleið 70.000 tons av turrfóðri verða brúkt í ár. Nøgdin av fiskalorti, sum kemur burtur úr, er umleið líka stór sum nøgdin av fóðri. Harafturat er ilt at sleppa undan, at nakað av fóðri fer til spillis. Fyri at samanbera nøgdirnar av lorti og fóðurspilli við nakað, vit kenna betri, so tilsvara nøgdirnar av turrum lívrunnum tilfari, sum kann takast upp, til turra tilfarið í eini 60.000 tonsum av toski.

IRF hevur eina tíð arbeitt við eini ætlan um turking og hitasóttreinsing av ávísum lívrunnum burturkasti við tí fyri eyga, at brúka turkaða tilfarið til tøð. Men heilsufrøðiliga avtalan við ES sær út til at fora fyri hesum. Treytirnar eru helst tær somu fyri tilfarið, sum verður sópað undan alibrúkunum.

Alivinnan hevur ment seg munandi seinastu árini. Flestu alibrúkini liggja á væl valdum støðum við góðum botnstreymi. Av tí av fiskalortur hevur umleið somu vekt sum sjógvur, verður hann spjæddur yvir eitt vítt økið. Hetta ger í mongum førum, at botndjór og smáverður klára at halda botnin reinan. Verður harafturat ein skipan við skiftisøkjum nýtt, kemur vistskipanin á botni aftur í rættlag eftir stuttari tíð.

Skuldi nakað av fiskalorti og fóðurleivdum verið tikið upp á land, so skuldi tað verið gjørt, tá fiskurin fær medisinfóður, tí medisinleivdir í umhvørvinum kunnu fáa sera óhepnar fylgjur fyri alivinnuna. Hetta lívrunnað tilfarið kann ikki brúkast, men skal fyribeinast – brennast við høgum hita.

Nú vit eru við skarn og leivdir frá húsdjórum og nýtslu av hesum, átti eisini at verði umrøtt, hvussu seyðatøð best verða gagnnýtt. Hetta eru tøð, sum nátúrliga kunnu at vera løgd út á landi, men sum ofta enda í bingjunum hjá IRF í stórum nøgdum. Um tøðini ikki vera løgd út á bø, í veltir ella aðrar staðir, kundu tey kanska heldur verið koyrd á moldplássið í kommununi og blandaði upp í moldina saman við gomlum hoyggi, enn at verið koyrd á brennistøðina í Leirvík.

### Náttúra og umhvørvi í undirvísing

»Kunnu vit fáa undirvísingartilfar um náttúru og umhvørvið inn í skúlarnar« var evnið mikukvøldið. Fleiri áhugaverd mál vóru viðgjørd og er ætlanin at venda aftur til okkurt av tí til eitt annað høvið.

Møguleikar eru at troyta fakini »Heimstaðarlæra« í yngru flokkunum og »Náttúra og tøkni« í eldru flokkunum í barnaskúlanum. Her finst nakað av tilfarið um lívfrøði, landafrøði og alis- og evnafrøði. Møguleiki er eisini at arbeiða við úrvaldum evnum eina tíð.

Nú IRF er farið undir økta skiljing av ruski ella »Nú heitt verður á fólk um ikki at blanda ruskið saman«, sum Bjørn Jacobsen frá Miljøheimevernet í Møre og Romsdal tók til, hevði tað verið gott um skúlarnir hjálptu til, t.d. við at havt tvær ruskspannir í hvørjari skúlastovu; eina spann til pappír og eina til tað, sum skal brennast. Onkur hevur kanska hug at fara longur og hava eina størri skipan á skúlanum, soleiðis at til ber at skilja í lívrunni, pappír, serliga dálkandi og vandamikið, og tað sum skal brennast. Tá ber t.d. eisini til at læra børnini um kompost.

### Jólatrø úr Vágum

Hóskvøldið var evnið »Hvussu kunnu vit gagnnýta alt lívrunnið tilfar?«. Tosað varð um at mala trø og greinar og síðani leggja tilfarið um trø og runnar í urtagørðum og viðarlundum. Harafturat varð tosað um at gera kompost. Hetta er umhvørvisvinarlig hugsan, sum eigur at vera ment.

Tíverri varð ein rættuliga yvirdrivin kostnaðarmeting um flutning av jólatrøum løgd fram á fundinum og borin fram í útvarpi. Sagt varð, at tað kostar kommununum í Vágum umleið 130.000 kr at fáa flutt 800 jólatrø úr Vágum til Leirvíkar at brenna. Hetta roknistykkið skal tíverri eisini brúkast sum grundarlag fyri, at kommunur ætla at keypa kvarnir til greinar, jólatrø og tílíkt.

Skipanin millum IRF og kommunurnar er soleiðis, at ein ávís nøgd av burturkasti av bingjuplássunum er roknað upp í fasta gjaldið frá kommununum til IRF. Flutningurin av burturkastinum frá kommununi til Leirvíkar er uppi í prísinum. Fer nøgdin upp um hesa kvotuna, má kommunan gjalda eitt ískoytisgjald í mun til meirburturkastið. Um tað er rætt, sum ført varð fram á stevnuni, er einki annað burturkast komið av bingjuplássunum úr Vágum í fyrsta ársfjórðingi enn jólatrø. Hetta er sjálvandi ikki rætt. Jólatrø eru bert ein lítil partur av burturkastinum úr Vágum.

IRF hevur heitt á kommunurnar um at skipa bingjuplássini betri, millum annað við at hava fólk á plássunum, tá tey eru opin. Tær kommunur, sum hava roynt hetta, hava skjótt funnið út av, at eykagjaldið fyri burturkast av bingjuplássunum hvørvur. Samstundis minnir hetta tilvitskuna um burturkast hjá fólki á staðnum.

### Ruskposalitir hjá IRF

Uttanfyri dagsskrá var á fundunum, í bløðum og útvarpi ført fram, at IRF og KB brúka skeivar litir til ymisku bólkarnar av burturkasti.

IRF umrøddi litval í sambandi við, at ein nýggjur posi er tikin í nýtslu til pappír. Væl vitandi, at grøni liturin ikki er tann best hóskandi til serliga dálkandi burturkast, varð valt at halda fast um hann. Flestu vita, hvat Grønur posi frá IRF er ætlaður til.

Hóast IRF veit, at marglitta skipanin, sum varð førd fram á fundunum og í fjølmiðlunum, ikki verður brúkt í Danmark, hevur IRF kannað pástandin um nýtslu av nevndu litskipan. Vit hava spurt hjá okkara egnu mynduleikum, donskum mynduleikum, norskum mynduleikum og størsta renovatiónsfelagsskapi í Danmark. Eingin av hesum stovnum og felgasskapum kennir til nakra millumtjóða samtykt um at nýta ávísa litskipan til ymsu bólkarnar av burturkasti frá húsarhaldum. Sjálvt ikki katalogútgevarin, sum víst varð til, veit, hvar lituppskotið er komið frá. Hvør renovatiónsfelagsskapur kann enn frítt velja tað litsamanseting, sum honum hóðar. Um tað er so heppið, er ein onnur søga.

IRF fer at brúka verandi litskipan enn eina tíð; nevniliga gráan posa til rusk, sum skal brennast, hvítan pappírsposa til reint og turt pappír og grønan posa til serliga dálkandi og vandamikið burturkast. Kemur ein fleirtjóða samtykt, um at brúka ávísa litskipan til rusk frá húsarhaldum, fer IRF sjálvandi at leggja seg eftir hesi skipan.

Tað harmar, at pástandir sum omanfyri nevndu verða førdir fram, tí teir skaða í grundini málið, arbeitt verður fyri, og kundu verið umgingnir, um tosa varð um viðurskiftini, áðrenn farið var í pressuna. Meira hóskandi hevði kanska verið at bjóða renovatiónsfelagsskapunum við til seinasta fundin á stevnuni og soleiðis fingið eina breiðari umrøðu av evninum.

## Bókin »Lívið her og hinumegin«

**Tíðindaskriv**




Soleiðis eitur bók, sum Ása V. Hansen hevur givið út á egnum forlag. Hon viðgerð í stuttum, lættlesiligum kapitlum ymiskar grundleggjandi spurningar, sum hava við lív og ævinleika at gera.

Er lív eftir deyðan? Kann ævinleikin prógvast vísindaliga? verður spurt í fyrstu kapitlunum. Og út frá hesum spurningum verður so komið inn á bíbilskar hendingar, á Jesusar lív og deyða fyri okkum, og hvussu vit fáa frelsu og uppreisnarlív gjøgnum hann.

Men Ása kemur eisini inn á upplivingar, talið 666, friðarríkið og ymsar spurningar, sum ivaleyst mong menniskju hugsa um. Bókin endar við tí, sum Opinberingin hevur at siga um nýggjar himlar og nýggja jørð, sum øll tey, sum kenna Harran Jesus, einaferð skulu uppliva.

Sjálv sigur hon í fororðinum: Ætlanin við hesum bóklinginum er at fáa teg at steðga á, og geva tær stundir at hugsa um ævinleikan. Sum ungur hugsar ein, at ein hevur alt lívið fyri sær, og tað kann eisini vera sera spennandi, hvat lívið hevur at bjóða. Útbúgving, seta búgv, fáa børn, sum krevur nógv av eins tíð. Summi seta føtur undir egið borð, onnur fara upp í politikk, og alt hetta er spennandi og tykist eggjandi, og hví skal ein so hugsa um lívið eftir deyðan?

Tað skulu vit, tí vit eiga ikki dagin í morgin. Vit eru her á fold, eisini fyri at taka avgerð fyri ævinleikanum.

»Lívið her og hinumegin« er 87 blaðsíður, kostar 85 kr. Og er væl egnað at geva teimum, sum eru farin at hugsa um ævinleikan og treingja til vegleiðing.

gult13 cyan13 magenta13 svart13



Nevndarformaðurin í Maersk Air:

# Atlantsflog fram um ferðafólkið

**Føroyskir politikkarar hava fyrr hugsað meira um tørvin hjá føroyska flogfelagnum enn hjá ferðafólkunum. Men nú er hugburðsbroyting hend, sigur Bjarne Hansen, nevndarformaður í Maersk Air**



*Føroyskir myndugleikar hava fyrr tikið tørvin hjá Atlantsflog fram um tørvin hjá teimum ferðandi. Men nú er hugburðsbroyting hend, sigur nevndarformaðurin í Maersk Air, Bjarne Hansen.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Ein hugburðsbroyting hjá føroyskum politikkarum er hend seinnu árini til fyrimuns fyri tey, sum ferðast loftvegis til og úr Føroyum, sigur nevndarformaðurin í Maersk Air, Bjarne Hansen.

Hann sigur, at fyrr var tað soleiðis, at tað gekk illa – fyri ikki at siga als ikki – at fáa føroyskar politiskar myndugleikar at ganga við til at seta ferðaseðlaprísin hjá flogfeløgunum niður.

– Tað var líkt til, at hugsað varð meira um tørvin hjá føroyska flogfelagnum enn um, hvat gagnaði tí ferðandi best, sigur hann.

Men nú er vend komin í, og tað er núverandi ferðslumálaráðharranum, Bjarna Djurholm, at takka, sigur Bjarne Hansen. Hann hevur víst heilt øðrvísi hugburð á økinum, enn undanfarin landsstýri hava gjørt, sigur nevndarformaðurin í Maersk Air.

Ferðaseðlaprísirnir skulu góðkennast av loftferðslumynduleikunum – í Føroyum av Vinnumálastýrinum. Men tað hevur fyrr gingið sera illa at fáa loyvi at lækka prísirnar við ávísum tilboðum, vísir Bjarne Hansen á. Ikki fyrr enn nú, nýggjur ferðslumálaráðharri er komin í Tinganes, tykjast marknaðarkreftirnar vera slopnar framat, sigur hann.

At tað hevur gagnað Maersk Air, at framtøk við lágum ferðaseðlaprísum vórðu gjørd í fjør, dylur Bjarne Hansen ikki fyri.

Flogførini vórðu fylt, tí fólk slapp bíliga millum londini. Og tá flogfarið framman undan fleyg við tómum setrum kortini, var tað jú bara ein inntøka afturat, at fleiri fólk ferðaðust fyri lægri prís. Tað verður annað keypt enn ein ferðaseðil, tá soleiðis er.

### Nýggjur floti

Flogførini hjá Maersk Air eru millum tey nýggjastu í heiminum. Bjarne Hansen, nevndarformaður í Maersk Air, upplýsir, at felagið vanliga ikki hevur flogførini longri enn eini fýra-fimm ár, áðrenn tey verða seld víðari.

– Hetta er ein politikkur, sum flestu onnur flogfeløg ikki hava. Men tað kemst kanska av, at eg eri uppvaksin hjá A.P. Møller, har vanligt er, at skipini alla tíðina eru á sølulistanum, sigur hann.

Og hann metir ikki nakað vera til hindurs fyri, at tað, sum ber til í skipaferðsluni, eisini kann bera til í flogferðsluni.

Um góða úrslitið hjá Maersk Air í fjør sigur nevndarformaðurin, at tann stóri parturin av avlopinum júst stavar fra keypi og sølu av flogførum.

Tað er við hesum sum við øllum øðrum handli. Tað ræður um at vera úti um seg og vita, nær ein skal keypa og selja.

### Nýtt slag

Maersk Air fer á nýggjárinum bara at hava jet flogfør. Tey seinastu propellflogførini verða skift út nú í heyst.

Flogførini, Maersk Air brúkar til ferðafólkaflutning, eru tey kendu Boeing 737 og tey nýggju Canadair Regional Jet flogførini, sum felagið longu hevur nøkur av.

Hesi flogførini verða gjørd í Canada og eru vorðin ein rættilig »succes« beinanveg, sigur Bjarne Hansen. So væl umtókt eru tey, at verksmiðjan stendur seg ikki at gera hesi flogførini. Gjørd eru 500 flogfør til flogfeløg um allan heim, meðan onnur 550 eru umbiðin. Verksmiðjan klárar at lata 14 um mánaðin, so tað verða nøkur ár, til bara tað, sum longu er umbiðið, verður latið.

Tað ger so aftur, at verksmiðjan ongan tørv hevur á at lata avsláttur. Prísurin fyri eitt Canadair Regional Jet við 50 setrum liggur um 23-24 milliónir $, meðan eitt við 70 setrum kostar 30 milliónir $, sum í dag eru góðar hálvttriðjahundrað milliónir krónur. Ella tað sama sum ein undirsjóvartunnil undir Vestmannasund.

Canadair flogførini eru minni enn Boeing 737. Tríggjar støddir er við 50 - 70 og 90 setrum. Tey eru sera vælegnað at flúgva innanríkis við, men verða eisini brúkt á millumtjóða rutum.

Sum vitiligt er, eru bæði fyrimunir og vansar við einum flogfari, sum við øllum øðrum. Hesi nýggju flogførini flúgva sera skjótt, men so hava tey eisini brúk fyri rættiliga longari breyt bæði til at lætta og lenda. Og tað ger so aftur, at tey ikki eru egnað at flúgva til Føroya við, sigur Bjarne Hansen, nevndarformaður í Maersk Air.

